


Trolbáturin, Norðleivur, er nýbygningur.



Trolbáturin, Randi, er 35 ára gamal, men í besta standi.

# Ymiskar fyritreytir fyri endurnýggjan

**Seinastu árini hava trý orð verið nógv frammi í politiska kjakinum. Orðini eru "endurnýggjan av veiðiflotanum." Orðini eru søgd í ymiskum samanhangum og av ymiskum fólkum. Øll, sum hava tosað um endurnýggjan, tykjast at hava verið samd um, at hon er neyðug. Men stóri spurningurin er, hvussu hon skal fara fram?**

**Fyritreytirnar fyri "endurnýggjan" eru ymiskar, og tí vilja úrslitini eisini verða ymisk**

ENDURNÝGGJAN
*Orð og myndir:*
*Torleif Johannesen*

Í hesi grein fari eg at nevna tvey línuskip og tveir trolbátar, sum á ymiskan hátt eru "úrslit" av endurnýggjanini.

Endamálið er ikki at siga, hvør hevur gjørt rætt, hvør hevur gjørt skeivt ella at siga, at allir hava gjørt rætt ella, at allir hava gjørt skeivt.

Ymiskar meiningar kunnu vera um, hvat er rætt, og hvat er skeivt í hesum samanhangi. Eftirtíðin kemur óivað at geva rættasta svarið.

Eg fari í stuttum at siga frá, hvussu endurnýggjanin av hesum fýra skipunum er farin fram.

## Randi og Norðleivur

Trolbáturin, Randi á Toftum, er bygdur í 1967. Seinastu árini hevur hann fingið umfatandi endurnýggjan. Skrokkurin er settur í besta stand, motorurin er skiftur, og brúgvin er lyft upp. Seinasta endurnýggjanin er, at báturin er vorðin innilokaður.

Sigast má, at hóast Randi er 35 ár, so er hon í besta standi.

Endurnýggjanina kostaði umleið 2,5 milj. krónur.

Trolbáturin, Norðleivur í Leirvík, kom nýbygdur í flotan í vár. Hann er sostatt eitt týðuligt úrslit av endurnýggjanini. Prísurin var 6 milj. krónur.

Norðleivur og Randi eru stórt sæð líka stórir og hava so gott sum somu veiðimøguleikar.

## Klakkur og Stapin

Línuskipið, Klakkur í Klaksvík, er bygdur í 1960. Hann hevur seinastu árini fingið umfatandi endurnýggjan. Stórt sæð alt maskinrúmið er nýtt og brúgvin við. Øll uppihaldsrúmini har afturi eru nýggj.

Í summar fekk Klakkur seinastu endurnýggjanina, tá ið alt frammskipið varð gjørt av "nýggjum". Sigast má, at hóast Klakkur er 42 ára gamal, er han í besta standi.

Endurnýggjanin kostaði umleið 9,5 milj. krónur.

Línuskipið, Stapin á Toftum, kom í flotan í heyst. Hann er eisini eitt týðiligt úrslit av endurnýggjanini. Hann er eitt frystilínuskip, bygt í 1988.

Endurnýggjanin kostaði umleið 16,5 milj. krónur.

Klakkur og Stapin eru stórt sæð somu stødd og hava so gott sum somu veiðimøguleikar. Møguliga eigur reiðaríið hjá Stapanum fleiri fiskidagar til skipið.

## Øll góðynski

Fleiri nýggj fiskiskip eru komin í føroyska flotan, og fleiri eru ávegis. Nøkur eldri verða endurnýggjað. Nógv umtalaða endurnýggjanin er í gongd.

Framtíðina kennir eingin, men spennandi verður at fylgja gongdini.

At enda fari eg at ynskja skipum og manningum góðan fiskiskap.

Eisini fari er at ynskja øllum okkara sjófólki eini gleðilig jól og Harrans signing í komandi ári.



Stapin kom í føroyska fiskiskipaflotan í heyst.



Klakkur, sum er bygdur í 1960, er endurnýggjaður.




